# Fuglafjarðar Svimjifelag vann Skeggjar stevnuna



*Elspa Mørkøre, sum her sæst í miðjuni, hevur seinastu árini vunnið tað, sum vinnast kann*

Árliga Skeggjar stevnan var um vikuskiftið í Gøtu.

Lagt varð fyri fríggjakvøldið við bólki 1, svimjarar í árganginum 95 og yngri. Aftur hesaferð gjørdi Poula Ø. Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag bart og vann allar sínar kappingar, fýra íalt. Turið Christiansen úr Reka gjørdist nummar tvey í trimum kappingum og Birita Debess nummar tvey í tí einu kappingini. Hjá dreinginum var Alvi Mikkelsen úr Ægir tann sum vann báðar tær fyrstu kappingarnar, meðan Tróndur J. á Høvdanum úr Skeggjar og Hákun Edmundsson úr Flot vunnu hvør sína kapping. Liðsvimjingarnar í bólki 1 vunnu grannabygdirnar Fuglafjørður og Leirvík.

Eftir kappingarnar fríggjakvøldið hevði Fuglafjarðar Svimjifelag lagt seg á odda í tí samlaða og skuldi tað vísa seg at tey lógu á odda alla kappingina, og vunnu hana.

Leygarmorgunin varð so hildið fram við bólki 2, svimjarar í árganginum 93 og 94. Vinnari í einstøku kappingunum gjørdist Elisabeth Bærentsen úr Tvøroyrar Svimjifelag, sum vann tvær kappingar, meðan Hildur á Fløtti og Dagmar M. Winther úr Havnar Svimjifelag vunnu hvør sína kapping. Hjá dreinginum vórðu fýra vinnarar og vórðu teir Magnus Jákupsson og Sasho M. Bjartsson úr Havnar Svimjifelag, Benjamin Simonsen úr Fuglafjarðar Svimjifelag og Heðin Olsen úr Reka. Aðrir svimjarar í bolki 2, sum góvu teimum, ið vunnu, harða kapping, vórðu m.a. Helena Strøm úr Vágs Svimjifelag, Benjamin Sikivat úr Tvøroyrar Svimjifelag, Pól Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag, Arni Gregersen úr Skeggjar og Helena Gunnarsdóttir úr Havnar Svimjifelag. Liðsvimjingarnar í bólki 2 vunnu Havnar Svimjifelag tríggjar og Reki tí einu.

Aftaná ein drúgvan leygarmorgun slapp bólkur 3 fram at, svimjarar í árganginum 91 og 92. Sum ikki einaferð vórðu tað tey bæði Elspa Mørkøre úr Skeggjum og Pauli Ø. Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag, ið vunnu bólk trý, Elspa vann allar sínar kappingar, meðan Pauli vann tríggjar Tað hevur verið sera spennandi at fylgt teimum báðum jøvngomlu svimjarunum heilt afturi frá bólki 1 og upp til dagin í dag. Næsta ár flyta tey bæði upp í bólk 4. Arnold Davidsen úr Flot vann tí einu kappingina. Liðsvimjingarnar í bólki 3 vunnu Skeggjar og Flot. Aðrir svimjarar í bólki 3, ið kláraðu seg væl, vóru m.a. Jóan Símun Edmundsson úr Flot, Petur Mcintosh, Bjørg Seloy og Fríða við Streym úr Havnar Svimjifelag, Malan Bærentsen og Mona Simonsen úr Tvøroyrar Svimjifelag.

**Úrslitið av kappingini gjørdist sostatt:**

| Felag | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| 1 Fuglafj. Svimjifelag | 9 | 4 | 4 |
| 2 Havnar Svimjifelag | 7 | 9 | 8 |
| 3 Skeggjar | 7 | 3 | 3 |
| 4 Reki | 4 | 4 | 1 |
| 5 Flot | 4 | 3 | 9 |
| 6 Tvøroyar Svimjifelag | 2 | 6 | 3 |
| 7 Ægir | 2 | 2 | 0 |
| 8 Vágs Svimjifelag | 0 | 0 | 4 |

## Minstukrøv í gildi

Millum lógarbroytingarnar, sum FSF fer at leggja fyri aðalfundin er eisini áseting av minstukrøvunum hjá UEFA.

Her hevur UEFA kravt av limalondum sínum, at krøvini verða sett í gildi í Føroyum. Fótbóltssambandið hevur í longri tíð arbeitt við málinum, og hava øll feløgini eisini fingið eina sonevnda loyvishondbók útflýggjaða. Á aðalfundinum verður lagt fram uppskot um, at minstu-krøvini frá UEFA verða galdandi fyri Føroyar, soleiðis sum ásett er í loyvisbókini.

**-jm**

## Sáttmálar skulu verja feløgini

FSF mælir nú til, at tvey sløg av leikarasáttmálum verða gjørdir. Ein – ið er hin verandi – har leikarar fáa samsýning fyri at spæla við einum felag, og ein nýggjan, sum leikarar, ið onga samsýning fáa, verða knýttir at feløgum sínum.

Uppskot til lógarbroytingar í hesum sambandi sigur, at fyri at leikari skal kunna spæla við 1. og 2. deild hjá monnum, skal hesin hava eina av FSF góðkenda avtalu.

Hetta verður fyrst og fremst gjørt til tess at tryggja feløgunum eitt betri útgangsstøði, tá leikarar flyta til nýtt felag. Antin í Føroyum ella uttanlands.

Hartil verður mett, at hetta kann virka til at geva leikarunum tryggari og betri skipað viðurskifti at spæla fótbólt í, eins og tað at enda verður sagt, at hetta kann virka við at økja um møguleikan hjá leikarum at gerast avtaluleikarar í egnum felag.

**- jm**



*Tað hevur Pauli Øssurson Mohr eisini, og tey bæði, sum eru at kalla púra javngomul, eru eisini millum teirra, sum Petur Heðin á Fløtti hevur tikið út til talentliðið*

VÍF-Søljan 32-15 (14-9):

## Nógv reytt í Vestmanna

**Trý reyð kort var nokk tað, sum størsti dramatikkurin snúði seg um í Vestmanna, har VÍF annars ikki hevði trupulleikar av Søljuni**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Kvinnuliðið hjá VÍF avgreiddi sín setning, tá tær mikukvøldið høvdu vitjan av Søljuni.

Søljan hevur seinasu umførini givið greið tekin um, at tær ætla at toga seg longur upp á talvuni, men í Vestmanna var tó ikki tað stóra hjá teimum at gera.

VÍF fekk annars ein lítlan skelk tíðliga í dystinum, tá tær fingu leikara rikna av vølli, men hetta tóktist tó ikki at nerva avrikið stórvegis.

Fyri steðgin togaðu tær seg spakuliga frá Søljuni, og tá liðini komu út til seinna hálvleik, vaðr allur ivi beindur til viks. Eftir einum korteri var munnurin varð øktur upp í 25-10, og so var ikki stórt meira at gera hjá Søljuni. Restina av dystinum tók VÍF tað meira róligt, og einasti dramatikkurin vóru tvey reyð kort til Søljuna, tá tvær av leikarunum fingu sína trijðu útvísing.

Hvussu er og ikki, so heldur VÍF við sigrinum fast í stuttu frástøðuni upp til VB, soleiðis at liðið møguliga kann ota seg upp á silvurplássið. Hjá Søljuni tykist støðan nú vera tann, at tær einamest bíða eftir dystunum móti hinum liðunum, sum eru niðarliga stødd á talvuni, soleiðis at tær kanska kunnu klintra seg upp á fimta plássið.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Søljan 32.15 (14-9)**

**Málskjúttar**

**VÍF:** Irina Radovici 7, Jacklin Durhuus 6, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 5, Ioana Rápa 4, Sóley Mikkelsen 3, Eyðritt Andreasen 3, Fríða Marjunardóttir 2, Linda Johannesen 2

**Søljan:** Heidi Maria Akselsen 5(1), Arnleyg Haraldsen 4, Nicoleta Radu 3, Hertha Simonsen 1, Irdi Mikkelsen 1

**Brotskøst:** VÍF 1, Søljan 3

**Útvísingar:** VÍF 2, Søljan 7

**Diskvalifikatión:** VÍF 1 (beinleiðis reyt), Søljan 2 (3X2 minuttir í báðum førum)

**Dómarar úr Stjørnuni:** Kristian Joensen & Karsten Joensen.



# Úrslit - Skeggjarstevnan

**Kapping:1-100 metur Rygg dreingir B.1 Grand prix**

| Nr | Navn | árg | Felag | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Alvi Mikkelsen | 96 | Ægir | 2.02.5 |
| 2 | Tróndur J.-Á Høvdanum | 95 | Skeggjar | 2.05.7 |
| 3 | Hákun Edmundson | 96 | Flot | 2.13.7 |

**Kapping:2-100 metur Rygg gentur B.1 Grand prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Poula Mohr | 95 | FS | 1.51.3 |
| 2 | Turið Christiansen | 95 | Reki | 2.03.3 |
| 3 | Marta Thomsen | 95 | FS | 2.07.2 |

**Kapping:3-33 metur Frí Dreingir B.1**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Alvi Mikkelsen | 96 | Ægir | 0.27.5 |
| 2 | Tróndur J. Á Høvdanum | 95 | Skeggjar | 0.27.8 |
| 3 | Jóhan Heðinson | 95 | FS | 0.29.4 |

**Kapping:4-33 metur Frí Gentur B.1**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Poula Mohr | 95 | FS | 0.25.9 |
| 2 | Turið Christiansen | 96 | Reki | 0.26.8 |
| 3 | Birita Debes | 95 | Flot | 0.27.7 |

**Kapping:5-50 metur Rygg Dreingir B.1 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Tróndur J. Á Høvdanum | 95 | Skeggjar | 0.57.7 |
| 2 | Alvi Mikkelsen | 96 | Ægir | 0.58.6 |
| 3 | Hákun Edmundson | 96 | Flot | 1.03.9 |

**Kapping:6-50 metur Rygg Gentur B.1 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Poula Mohr | 95 | FS | 0.49.5 |
| 2 | Birita Debes | 95 | Flot | 0.56.2 |
| 3 | Turið Christiansen | 96 | Reki | 0.58.9 |

**Kapping:7-33 metur Bringa Dreingir B.1**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Hákun Edmundson | 96 | Flot | 0.36.7 |
| 2 | Jóhan Heðinson | 95 | FS | 0.42.0 |
| 3 | Baldur Djurhuus | 95 | FS | 0.46.0 |

**Kapping:8-33 metur Bringa Gentir B.1**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Poula Mohr | 95 | FS | 0.35.5 |
| 2 | Turið Christiansen | 96 | Reki | 0.36.3 |
| 3 | Eva Petersen | 96 | Skeggjar | 0.44.3 |

**Kapping:9-4x33 metur Frí Dreingir B.1**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Fuglafjarðar Svimjifelag | | FS | 2.26.3 |
| | Jóhan Heðinsson | | | |
| | Benjamin Rouah | | | |
| | Baldur Djurhuus | | | |
| | Daniel Obradovic | | | |

**Kapping:10-4x33 metur Frí Gentur B.1**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Reki | | Reki | 2.17.6 |
| | Tóra Djurhuus | | | |
| | Eva Trygvadóttir | | | |
| | Óluva Jacobsen | | | |
| | Turið Christiansen | | | |
| 2 | Fuglafjarðar Svimjifelag | | FS | 2.19.0 |
| | Martha Thomsen | | | |
| | Poula Mohr | | | |
| | Lív Hansen | | | |
| | Jóhanna Egholm | | | |
| 3 | Flot | | Flot | 2.32.8 |
| | Jórun Hansen | | | |
| | Birita Debes | | | |
| | Bjørg Olsen | | | |
| | Elin Dahl Hansen | | | |

**Kapping:11-100 metur Rygg Dreingir B.2 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Magnus Jákupsson | 94 | HS | 1.50.3 |
| 2 | Benjamin Sikivat | 93 | TS | 1.52.9 |
| 3 | Hallur Peturson | 94 | VS | 1.54.7 |

**Kapping:12-100 metur Rygg Gentur B.2 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Elisabeth Bærendsen | 93 | TS | 1.39.3 |
| 2 | Hildur á Fløtti | 93 | HS | 1.40.6 |
| 3 | Helena Strøm | 94 | VS | 1.44.3 |

**Kapping:13-66 metur Frí Dreingir B.2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Heðin Olsen | 94 | Reki | 0.54.9 |
| 2 | Benjamin Simonsen | 94 | FS | 0.55.5 |
| 2 | Sacho M. Bjartson | 93 | HS | 0.55.5 |

**Kapping:14-66 metur Frí Gentur B.2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Elisabeth Bærendsen | 93 | TS | 0.53.8 |
| 2 | Hildur á Fløtti | 93 | HS | 0.55.2 |
| 3 | Helena Strøm | 94 | VS | 0.56.2 |

**Kapping:15-50 metur Rygg Dreingir B.2 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Sacho M. Bjartson | 93 | HS | 0.49.4 |
| 2 | Magnus Jákupsson | 94 | HS | 0.49.9 |
| 3 | Pól Mohr | 94 | FS | 0.50.7 |

**Kapping:16-50 metur Rygg Gentur B.2 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Hildur á Fløtti | 93 | HS | 0.45.7 |
| 2 | Elisabeth Bærendsen | 93 | TS | 0.46.6 |
| 3 | Helena Strøm | 94 | VS | 0.46.8 |

**Kapping:17-50 metur Bringa Dreingir B.2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Benjamin Simonsen | 94 | FS | 0.51.5 |
| 2 | Arni Gregersen | 93 | Skeggjar | 0.53.1 |
| 3 | Sacho M. Bjartson | 93 | HS | 0.57.9 |

**Kapping:18-50 metur Bringa Gentur B.2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Dagmar M. Winther | 93 | HS | 0.49.4 |
| 2 | Elisabeth Bærendsen | 93 | TS | 0.49.6 |
| 3 | Helena Gunnarsdóttir | 93 | HS | 0.51.3 |

**Kapping:19-4x33 metur Blandað Dreingir B.2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Reki | | Reki | 2.17.1 |
| | Kristian Berg | | | |
| | Heðin Olsen | | | |
| | Gunnar Vatnhamar | | | |
| | Torstein Joh Fríðfinnson | | | |

**Kapping:20-4x33 metur Blandað Gentur B.2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Svimjifelag | | HS | 1.54.9 |
| | Andrea Midjord | | | |
| | Dagmar M. Winther | | | |
| | Hildur á Fløtti | | | |
| | Helena Gunnarsdóttir | | | |
| 2 | Reki | | Reki | 2.13.5 |
| | Ruth Poulsen | | | |
| | Jóhann Bjørg Fuglø | | | |
| | Ingunn Olsen | | | |
| | Asta F. Jacobsen | | | |
| 3 | Skeggjar | | Skeggjar | 2.13.8 |
| | Birita Absalonsen | | | |
| | Marin Petersen | | | |
| | Gunnvá Justinussen | | | |
| | Margunn Jacobsen | | | |

**Kapping:21-4x33 metur Frí Dreingir B.2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Svimjifelag 1 | | HS | 1.53.8 |
| | Magnus Jákupsson | | | |
| | Jákup K. Hansen | | | |
| | Andrias R. Hansen | | | |
| | Sacho M. Bjartason | | | |
| 2 | Ægir | | Ægir | 1.58.0 |
| | Bjarni F. Petersen | | | |
| | Tim Melchiorsen | | | |
| | Kristian Petersen | | | |
| | Kristian Martin Joensen | | | |
| 3 | Havnar Svimjifelag 2 | | HS | 2.00.5 |
| | Hjórtur á Fløtti | | | |
| | Sveinur Fuglø | | | |
| | Hjarnar Tórarson | | | |
| | Rúni Fuglø | | | |

**Kapping:22-4x33 metur Frí Gentur B.2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Hs 1 | | HS | 1.46.8- 1.42.9 |
| | Helena Gunnarsdóttir | | | |
| | Andrea Midjord | | | |
| | Dagmar Winther | | | |
| | Hildur á Fløtti | | | |
| 2 | Reki | | Reki | 1.52.6 |
| | Ruth Poulsen | | | |
| | Ingunn Olsen | | | |
| | Asta F. Jacobsen | | | |
| | Jóhann Bjørg Fuglø | | | |
| 3 | Skeggjar | | Skeggjar | 2.04.1- 1.56.3 |
| | Elisabeth Magnadóttir | | | |
| | Margunn Jacobsen | | | |
| | Marin Petersen | | | |
| | Gunnvá Justinussen | | | |

**Kapping:23-100 metur Rygg Dreingir B.3 Grand prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | 91 | FS | 1.11.5 |
| 2 | Jóan Símun Edmundson | 91 | Flot | 1.17.7 |
| 3 | Petur Mcintosh | 91 | HS | 1.18.2 |

**Kapping:24-100 metur Rygg Gentur B.3 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Elspa Mørkøre | 91 | Skeggjar | 1.11.2 |
| 2 | Bjørg Seloy | 92 | HS | 1.19.3 |
| 3 | Mona Simonsen | 91 | TS | 1.24.5 |

**Kapping:25-50 metur Bringa Dreingir B.3**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Arnhold Davidsen | 91 | Flot | 0.36.3 |
| 2 | Pauli Ø. Mohr | 91 | FS | 0.37.0 |
| 3 | Jóan Símun Edmundson | 91 | Flot | 0.38.6 |

**Kapping:26-50 metur Bringa Gentur B.3**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Elspa Mørkøre | 91 | Skeggjar | 0.36.9 |
| 2 | Malan Bærendsen | 91 | TS | 0.41.1 |
| 3 | Fríða Við Streym | 91 | HS | 0.42.3 |

**Kapping:27-50 metur Rygg Dreingir B.3 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | 91 | FS | 0.33.9 |
| 2 | Petur Mcintosh | 91 | HS | 0.35.5 |
| 3 | Jóan Símun Edmundson | 91 | Flot | 0.36.0 |

**Kapping:28-50 metur Rygg Gentur B.3 Grand Prix**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Elspa Mørkøre | 91 | Skeggjar | 0.33.3 |
| 2 | Bjørg Seloy | 92 | HS | 0.37.8 |
| 3 | Mona Simonsen | 91 | TS | 0.40.1 |

**Kapping:29-66 metur Frí Dreingir B.3**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Pauli Ø. Mohr | 91 | FS | 0.39.6 |
| 2 | Jóan Símun Edmundson | 91 | Flot | 0.40.6 |
| 3 | Arnhold Davidsen | 91 | Flot | 0.42.9 |

**Kapping:30-66 metur Frí Gentur B.3**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Elspa Mørkøre | 91 | Skeggjar | 0.39.7 |
| 2 | Bjørg Seloy | 92 | HS | 0.46.2 |
| 3 | Mona Simonsen | 91 | TS | 0.46.6 |

**Kapping:31-4x33 metur Frí Dreingir B.3**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Flot 1 | | Flot | 1.19.6 |
| | Arnhold Davidsen | | | |
| | Harald S. Hansen | | | |
| | Remi Langgaard | | | |
| | Jóan Símun Edmundsson | | | |
| 2 | Havnar Svimjifelag 1 | | HS | 1.23.7 |
| | Jákup Símun Jacobsen | | | |
| | Tórur Hansen | | | |
| | Petur Mcintosh | | | |
| | Pauli Norðfoss | | | |
| 3 | Flot 2 | | Flot | 1.40.3 |
| | Jógvan Elias | | | |
| | Eli Frederiksberg | | | |
| | Tróndur Olsen | | | |
| | Kristian Joensen | | | |

**Kapping:32-4x33 metur Frí Gentur B.3**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Skeggjar | | Skeggjar | 1.25.9 |
| | Hildigarð Hansen | | | |
| | Sóley Strømsten | | | |
| | Elspa Mørkøre | | | |
| | Weronica Popczynska | | | |
| 2 | Ts | | TS | 1.31.4 |
| | Mona Simonsen | | | |
| | Sólvá Túna Rúnadóttir | | | |
| | Kristina Hansen | | | |
| | Malan Bærendsen | | | |
| 3 | Hs1 | | HS | 1.34.0 |
| | Rakul Jansdóttir | | | |
| | Fríða við Streym | | | |
| | Bjørg Seloy | | | |
| | Majun Eysturoy | | | |

**Kapping:33-4x33 metur Blandað Dreingir B.3**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Flot 1 | | Flot | 1.31.0 |
| | Jógvan Eliasen Davidsen | | | |
| | Arnhold Davidsen | | | |
| | Jóan Símun Edmundsson | | | |
| | Remi Langgaard | | | |
| 2 | Havnar Svimjifelag 1 | | HS | 1.36.3 |
| | Jákup Símun Jacobsen | | | |
| | Tórur Hansen | | | |
| | Petur Mcintosh | | | |
| | Pauli Norðfoss | | | |
| 3 | Flot 2 | | Flot | 2.07.5 |
| | Tróndur Olsen | | | |
| | Rasmun Hansen | | | |
| | Harald S. Hansen | | | |
| | Kristian Joensen | | | |

**Kapping:34-4x33 metur Blandað Gentur B.3**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Skeggjar | | Skeggjar | 1.41.8 |
| | Weronika Popczynska | | | |
| | Hildigarð Hansen | | | |
| | Elspa Mørkøre | | | |
| | Sóley Strømsten | | | |
| 2 | Ts | | TS | 1.43.9 |
| | Kristina Hansen | | | |
| | Malan Bærendsen | | | |
| | Mona Simonsen | | | |
| | Sólvá Túná Rúnardóttir | | | |
| 3 | Hs 1 | | HS | 1.47.1 |
| | Rakul Jansdóttir | | | |
| | Fríða við Streym | | | |
| | Bjørg Seloy | | | |
| | Marjun Eysturoy | | | |